# GÍ stílar høgt

**Venjarin hjá GÍ miðjar eftir, at hansara lið verður millum fýra tey bestu í landskappingini í ár. Nýggja liðið hevur mist fleiri av sínum royndu stuðulsspælarum, men teir ungu gerast støðugt eldri og meira royndir**

Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo



*– Vit halda fram við at byggja eitt nýtt GÍ-lið upp. Spælararnir eru blivnir eitt ár eldri og hava fingið fleiri royndir, og eg gleði meg veruliga til hetta árið, sigur Krzystof Popczynski, venjari*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Gøtumenn byrjaðu kappingarárið í fjør óvæntað væl. Meðan tey flestu høvdu roknað við, at saknurin av berandi kreftum frá árunum frammanundan fór at verða svárur, so brettu ungu menninir í felagnum upp um armar og løgdu til brots.

Í steypakappingini gekk sum eftir ánni, har GÍ vann sín bólk frammanfyri stóru favorittarnar HB og B36. Eisini í landskappingini var byrjanin góð, og eftir seks umfør lá GÍ næstfremst og hevði bara tapt ein dyst á øllum árinum.

Men so kom stígur í, og eftir summarsteðgin var tað líka við, at tað steðgaði heilt upp hjá gøtumonnum, sum endaðu kappingarárið sum nummar 7.

– Tað bleiv ov nógv hjá okkara ungu monnum í fjør. Teir skuldu spæla í landskappingini, í steypakappingini, har vit komu heilt til finaluna, og í Intertoto Cup, og í seinnu hálvu megnaðu vit ikki rættiliga at halda støðið, sigur Krzystof Popczynski, sum er venjari hjá GÍ aftur í ár.

## Millum fýra tey bestu

GÍ-venjarin roknar við, at tað verður øðrvísi í ár, tí ungu spælararnir hava fingið fleiri royndir, og GÍ hevur bara heimligu kappingina at hugsa um.

– Vit halda fram við at byggja eitt nýtt GÍ-lið upp. Spælararnir eru blivnir eitt ár eldri og hava fingið fleiri roynd, og eg gleði meg veruliga til hetta árið, sigur Krzystof Popczynski.

Hann heldur, at við tí fólki og tí venjingarstøðu, sum spælararnir eru í, hoyrir liðið heima millum fýra tey bestu feløgini í landinum.

– Klára vit koma fram millum fýra tey bestu, so verði eg sera fegin, sigur GÍ-venjarin.

## Mist royndir

GÍ má aftur í ár sanna, at teir hava mist fleiri av teimum royndu spælarunum, sum skuldu hjálpa teimum yngru til góð úrslit.

Bartal Eliasen og Bárður á Lakjuni eru farnir aftur til Fuglafjarðar at spæla, og tveir póllendingar koma ikki aftur til Gøtu. Harafturat er talentið Símun Samuelsen farin aftur til Vágs at spæla.

Hinvegin telir tað rætta vegin, at Atli Gregersen er komin heim úr Danmark og skal styrkja verjupartin, og at Poul Henning Jacobsen er farin aftur at spæla.

Tað hevur eisini verið tosað um, at fyrrverandi landsliðsspælarin Sámal Joensen skuldi taka gaggurnar fram aftur, men tað er óvíst, um hann fer at spæla, og um hann fer at spæla fyri GÍ, um so verður.

GÍ hevur fyrireikað seg væl til kappingarárið, og teir vóru herfyri í Íslandi á venjingarlegu, og har var dúgliga vant og spælt. Ein ungur spælari úr AGF var við á venjingarleguni og royndarvandi, men hann varð skaddur beinan vegin, og so spurdist ikki meira burtur í tí í fyrstu syftu.

GÍ ætlar sær ikki at seta seg upp afturá ella geva upp, fyri tað um fleiri av teimum royndu spælarunum eru burtur. Liðið fer at leggja til brots, og venjarin hevur eyguni fest á ovastu plássini á stigatalvuni.

**GØTU ÍTRÓTTARFELAG**
**FO-510 Gøtu, Postrúm 4**
**Tlf. 412024 / Fax 442024**
**www.gigotu.fo**

**STOVNAÐ:**
**29.10.1926**

**FORMAÐUR:**
**Jógvan Gregersen**

**MEISTARAR (6):**
**1983, 1987, 1993, 1994, 1995, 1996**

**STEYPAVINNARAR (5):**
**1983, 1985, 1996, 1997, 2000**

**GREIPUVINNARAR (2):**
**1983, 1996**

**Í 1. DEILD (24 ÁR):**
**1980-**

**Í EUROPA (11):**
**Meistarakapping 1997/98, Steypavinnarar 1998/99, UEFA Cup 1993/94, 1994/95, 1995/96, 1996/97, 1999/00, 2000/01, 2001/02, 2002/03, Intertoto 2003**

| Navn | Í fjør | Landsdystir | áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Málverjar** | | | |
| Hallur Hansen | 3/-11 (0-0) | | |
| Mortan Joensen | 1/0 (0-0) | | |
| **Verja** | | | |
| Poul Ennigarð | 11/0 (2-0) | | |
| Bjarni Justinussen | | | |
| Leivur Hansen | 17/0 (4-0) | | |
| Atli Gregersen | | | Randers Freja |
| Kaj Ennigarð | 7/0 (0-0) | | |
| Jónreid Dalheim | 16/0 (0-0) | | |
| **Miðvøllur** | | | |
| Hans Pauli Petersen | 14/1 (2-0) | | |
| Hanus Jacobsen | 5/0 (0-0) | | |
| Áslakur R. Petersen | 12/0 (0-1) | | ÍF |
| Høgni Madsen | 15/0 (4-0) | | ÍF |
| Súni Olsen | 14/3 (6-0) | | |
| Poul Henning Jacobsen | | | |
| Magnus Skoralíð | 12/0 (1-0) | | |
| Símun Louis Jacobsen | 9/0 (0-0) | | |

| Navn | Í fjør | Landsdystir | áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Álop** | | | |
| Poul Andrias Jacobsen | | | |
| Krysztof Popczynski (PÓL) | 12/5 (2-0) | | VB |
| Páll Rói Poulsen | 2/0 (0-0) | | |
| Pól Arni Jacobsen | 8/0 (0-0) | | |
| **Tilgongd** | | | |
| Atli Gregersen | | | Randers Freja |
| Poul Henning Jacobsen | | | Byrjaður aftur |
| **Frágongd** | | | |
| Bartal Eliasen | 15/5 (5-0) | | ÍF |
| Bárður á Lakjuni | 18/1 (0-0) | | ÍF |
| Zdzislaw Janik (PÓL) | 13/2 (1-0) | | |
| Símun Samuelsen | 16/4 (2-0) | | VB |
| Jacek Przybylski (PÓL) | 14/-22 (0-0) | | B68 |
| **Venjari** | | | |
| Krysztof Popczynski (PÓL) | | | |



# Nýtt jarn í verjuna

**Atli Gregersen er komin úr Danmark og til Gøtu at spæla fótbólt. Hóast ættin er úr Gøtu, hevur hann ongantíð áður spælt í gulu troyggjuni hjá GÍ. Nú stílar hann høgt saman við restini av unga liðnum**

Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

– Tey arga meg við, at eg eri havnamaður.

Atli Gregersen er fyri fyrstu ferð nakrantíð komin til Gøtu at spæla fótbólt. Eftirnavnið sigur ikki so lítið, men 21 ára gamli verjuspælarin hevur ongantíð verið í gulu gøtutroyggjuni.

Atli er uppvaksin í Havn, og síðani hann var 13 ára gamal hevur hann búð í Danmark. Pápi hansara, Árni, var sjónvarpsstjóri og búði í Havn, og familjan flutti til Danmarkar fyri fleiri árum síðani.

Nú er Atli komin heim til Føroya at spæla, og valið fall á GÍ.

– Pápi mín segði, at um eg fór heim at spæla, so var tað bara eitt felag, sum eg kundi fara til, sigur Atli.

– Hann skemtaði kanska eitt sindur, men tað vísti seg, at GÍ var áhugað í at fáa meg at spæla við teimum, og so tók eg av.

Ættarbondini til Gøtu eru sterk hóast alt. Atli býr hjá ommu síni, og hann hevur nógv onnur skyldfólk í bygdini eisini. Tveir pápabeiggjar hjá honum hava spælt nógv við GÍ. Jógvan Gregersen var dygdur verjuspælari, og Magnus Gregersen var vandamikil álopsspælari. Tað eru nøkur ár síðani, nakar Gregersen var á GÍ-liðnum, men nú er eitt sindur av Gregersen-jarni komið í gøtuverjuna.

## Royndi seg í Lyngby

Atli Gregersen spældi ungdómsfótbólt í B36, men síðani hann kom í tannáringaárini hevur hann spælt í Danmark. Hann kom til Randers at spæla longu sum dreingjaliðsspælari, og har varð hann líka til í fjør, tá ið hann flutti til Sælands at spæla.

Atli hevði sáttmála við Randers Ferja, men spælitíðin var ikki so nógv.

– Eina dystin varð ein miðvallarspælari tikin fram um meg til verjuna, og tá spurdi eg meg fyri hjá venjaranum og fekk at vita, at eg ikki stóð fremst í køini. Tí gjørdi eg av at flyta felag, sigur Atli.

Hann fór til Lyngby at spæla í fjør, og har spældi hann fast. Lyngby hevur verið í fíggjarligum trupulleikum flutti niður í Danmarksseriuna. Nú er felagið aftur í 2. deild, og har hevur Atli roynt seg.

Atli var eisini við í venjingini hjá Lyngby til fyri kortum.

– Tað kom knappliga á meg, at eg vildi sleppa heim at spæla fótbólt. Eg havi fingið allan uppstartin við í Lyngby, og eg kom ikki heim fyrr enn fyrst í mars mánað. Eg ivaðist eitt sindur í, hvat eg skuldi gera, men avgerðin fall so at fara heim at spæla.

– Eg havi ongantíð spælt vaksnamannafótbólt í Føroyum, og eg havi búð niðri seinastu 8 árini, so eg hevði ein longsul eftir at sleppa heim at búgva og spæla.

## Undirmett GÍ-lið

Eftir at GÍ eftir eina frálíka góða byrjan í fjør steðgaði upp, so hvørt sum tað leið út á summarið, munnu tað vera fá sum rokna við, at GÍ fer at gera um seg í oddinum í ár.

– Tað tykist, sum vit eru eitt sindur undirmettir, og tað passar okkum fínt. Eg haldi, at vit hava eitt sera gott lið. Eg kenni ikki øll liðini í Føroyum enn, men eg vænti, at vit fáa eitt gott úrslit í ár.

– Vit hava vunnið og tapt dystir higartil í ár, men hugurin millum spælararnar er sera góður. Tað eru nógvir ungir spælarar í felagnum, og tað passar mær fínt. Til onkrar venjingar eri eg millum teir eldru, so tá føli eg meg heilt gamlan og royni at spæla eitt sindur klókari, sigur Atli flennandi.

**Metingin**

Gøtumenn mistu ondina í seinnu hálvu av seinastu kapping, og vandi er fyri tí aftur í ár. Liðið hevur tó fólk til at enda í ovaru hálvu av stigatalvuni.



*– Eg havi ongantíð spælt vaksnamannafótbólt í Føroyum, og eg havi búð niðri seinastu 8 árini, so eg hevði ein longsul eftir at sleppa heim at búgva og spæla, sigur Atli Gregersen, sum er nýggjur maður í GÍ*

*Mynd: Maria Olsen*

Hann kennir lítið til 1. deild í Føroyum, tí hann hevur ongantíð spælt her, men hann hevur gjørt sær eina innleiðandi meting av, hvussu føroyskur fótbóltur er fyri.

– Ferðin á fótbóltinum í Føroyum er líka høg sum tað, eg kenni til í Danmark. Dystirnir eru tættir og intensir, og spælararnir orka væl at renna, men eg dugi ikki rættiliga at meta um tekniska støðið enn. Eg ivist ikki í, at føroysku feløgini høvdu klárað seg í donsku 1. deild.

## Landsliðið

Tað var fyri nøkrum fáum árum síðani, at Alti Gregersen framliga segði við Útvarpið, at hann ætlaði sær á føroyska landsliðið.

– Eg havi tikið hasa samrøðuna upp á band, so eg eigi hana. Eg eri blivin eitt sindur eldri síðani tá, so eg fari ikki at vera líka avgjørdur nú. Eg fari at royna at gera tað so gott, sum eg kann í GÍ, og so fáa vit at sigga, hvat tað røkkur til.

– Eg haldi, at eg havi hugsað ov langt og meira enn neyðugt, í staðin fyri at konsentrera meg um mína uppgávu á liðnum og gera tað so gott, sum eg kann her og nú. Tað ætli eg mær at gera nú, og so skal tað nokk fara at ganga.

Atli Gregersen verður ein av stuðulsspælarunum hjá GÍ í ár, og tað verður í verjuni, at hann skal loysa sína uppgávu sum avgjørdur og harður verjuspælari.

– Tað er nógv av tí rætta GÍ-andanum á liðnum í løtuni, og tí havi eg gott mót upp á hetta árið, sigur hann.